# Barna- og útbúgvingarmálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | Skrivið her |
| Mál nr.: | Skrivið her |
| Málsviðgjørt: | SJ/OYS |
| Ummælistíð: | Skrivið frá/til |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg nr. 64 frá 4. mai 2022 um triðja byggistig í umbygging og útbygging av miðnámsskúlanum á Kambsdali**
(Hækka upphæddina, sum landsstýrismaðurin verður heimilaður at brúka)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 64 frá 4. mai 2022 um triðja byggistig í umbygging og útbygging av miðnámsskúlanum á Kambsdali, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** § 1, stk. 2 verður orðað soleiðis: "Útreiðslurnar til verkætlanina kunnu í mesta lagi verða 94 mió. kr., íroknað prosjektering og innbúgv."

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og fer úr gildi 1. januar 2028.

**Kapittul 1. Almennar viðmerkingar**

**1.1. Orsakir til uppskotið**
Sambært løgtingslóg nr. 64 frá 4. mai 2022 um triðja byggistig í umbygging og útbygging av miðnámsskúlanum á Kambsdali, eru 71 mió. kr. settar av til at umbyggja og útbyggja miðnámsskúlan á Kambsdali íroknað fyrireiking, innbúgv og prosjektering, samsvarandi kostnaðarmetingini hjá Landsverk.

Triðja byggistig er seinasti liðurin í heildarætlanini frá 2012 um út- og umbygging í sambandi við samanlegging av miðnámsskúlunum á Kambsdali. Sambært høvuðsprosjektinum fevnir hesin parturin av verkætlanini m.a. um gera nýtt felagshøli, skúlastovur og køk, umframt at gera nýggjan brunaveg samsvarandi teimum brunakrøvum, ið Fuglafjarðar kommuna hevur sett.

Kostnaðarmetingin var grundað á eitt prosjektuppskot og eitt forprosjekt, tað er, at verkætlanin var ikki bjóða út, tá ið metingin var gjørd. Uttanríkis- og mentamálaráðið gjørdi tó av at beina málið um hækkingina upp í 71 mió. kr. fyri Løgtingið í 2022, tí verkætlanin tá var vaksin nógv í vavi og kostnaði í mun til áður galdandi verklagslóg frá 2018. Mett var tískil, at Løgtingið skuldi taka støðu til spurning, áðrenn verkætlanin var bjóðað út.

Nú verkætlanin er bjóða út, og innkomnu tilboðini gjøgnumgingin av Landsverk, hevur tað víst seg, at kostnaðarmetingin, sum var gjørd í samband við undanfarnu verklagslóg, var ov lág. Talan er um, at byggikostnaðurin er hægri enn mett, men eisini at aðrir óbeinleiðis kostnaðir, ið Landsverk metir um, eru hækkaðir, m.a. orsaka av óvissuni á marknaðinum í dag, sum hevur elvt munandi prísvøkstur.

**1.2. Galdandi lóggáva**
Galdandi lóggáva er løgtingslóg nr. 64 frá 4. mai 2022 um triðja byggistig í umbygging og útbygging av miðnámsskúlanum á Kambsdali

**1.3. Endamálið við uppskotinum**
Endamálið við lógaruppskotinum er at hækka upphæddina, sum landsstýrismaðurin verður heimilaður at nýta til bygging, við 23 mió. kr. úr 71 mió. kr. til 94 mió. kr.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**
Nú verkætlanin hevur verið boðin út, og Landsverk hevur gjøgnumgingið innkomnu tilboðini, hevur Landsverk mett kostnaðin fyri samlaðu verkætlanina at verða 94 mió. kr. íroknað prosjektering og innbúgv. Tískil er neyðugt, at hækka mest loyvdu upphæddina til byggiútreiðslur í verklagslógini, samsvarandi núverandi kostnaðarmeting hjá Landsverk.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**
Uppskotið hevur verið til ummælis hjá miðnámsskúlanum á Kambsdali, Landsverki og Fíggjarmálaráðnum.

Hoyringarsvarini eru løgd við sum fylgiskjøl til lógaruppskotið.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Verkætlanin hevur verið bjóða út, og við støði í innkomnu tilboðunum, metir Landsverk at samlaði byggikostnaðurin verður í alt 94 mió. kr., írokna prosjektering, ráðgeving, innbúgv.

Frá 2018 til 2022 eru brúktar 7,1 mió. kr. til fyrireiking og projektering. Á fíggjarlógini fyri 2022 eru 8,2 mió. kr. tøkar.

Landsverk mælir til, at útreiðslurnar fella soleiðis yvir ár: 22,38 mió. kr. í 2023, 53,71 mió. kr. í 2024 og 17,91 mió. kr. í 2025, men at verkætlanin annars verður framd sambært veittari játtan á fíggjarlógini.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Mett verður ikki, at uppskotið ber í sær umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunu.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Uppskotið ber við sær økt virksemi fyri byggivinnuna í byggitíðarskeiðnum.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Um- og útbyggingin fer at hava eina jaliga ávirkan á virksemið á staðnum, bæði í byggitíðarskeiðnum og ikki minst, tá um-og útbyggingin verður liðug.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum

Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri nakrar millumtjóðasáttmálar.

### 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri tvørgangandi millumtjóðasáttmálar.

### 2.9. Markaforðingar

Uppskotið hevur ongar kendar markaforðingar við sær.

### 2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv

Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv.

### 2.11. Skattir og avgjøld

Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skattir ella avgjøld.

### 2.12. Gjøld

Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

### 2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?

Lógaruppskotið áleggur ikki fólki skyldur.

### 2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?

Lógaruppskotið heimilar landsstýrismanninum at nýta upp til 94 mió. kr. til at um- og útbyggja miðnámsskúlan á Kambsdali.

### 2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?

Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

### 2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?

Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

### 2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**
*Stk. 2.*
Broytingin ber við sær, at mesta upphæddin, ið landsstýrismanninum verður heimilað at nýta til um- og útbygging av miðnámsskúlanum á Kambsdali verður hækkað úr 71 mió. kr. til 94 mió. kr., svarandi til eina hækking á 23 mió. kr.

Somuleiðis framgongur tað nú greitt av lógartekstinum, at samlaða upphæddin til verkætlanina á 94 mió. kr. er íroknað prosjektering og innbúgv. Hetta ber tó ikki við sær nakra broyting í mun til økta verkætlanarkostnaðin, tí útreiðslur til prosjektering og innbúgv eru longu við í samlaða verkætlanarkostnaðninum, sambært viðmerkingunum til galdandi løgtingslóg.

**Til § 2**
Løgtingslógin fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Lógin fer úr gildi 1. januar 2028, tá ið samtykta játtanarskeiðið er av,og umbyggingin og útbyggingin væntandi er liðug.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið, dagfesting.

**Djóni Nolsøe Joensen**
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2:
Fylgiskjal 3: